**§ 37: Grundleggjandi ásetingar fyri økini L1 – L4: Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding**

1. Endamálið við økjunum er at skapa møguleika fyri frítíðar- og ferðavinnuvirksemi. Hvørt undirøki hevur eitt nágreinað endamál, sum ásetur, hvørji sløg av virksemi og bygging eru loyvd innan hvørt øki. Bygningar til felags umsiting og tænastuveitingar, kunnu byggjast á øllum økjunum. Byggimyndugleikin kann krevja, at felags ruskstøð verður skipað fyri at lætta um ruskinnsavningina.

2. Loyvt er at gera fleiri frítíðareindir til útleigan á sama matrikli, ella at sundurbýta matrikulin eftir nærri ásetingum.

3. Byggistigið er ymiskt fyri undirøkini.

4. Innleggingar: Frítíðarhús skulu sum minstamát hava lagt el, hita og vatn til húsini, og kloakk frá húsunum. Harumframt skulu neyðug gøtuljós verða uppsett inni á økinum. Allar íløgur, hesum viðvíkjandi, skulu rindast av byggiharranum, umframt at byggiharrin skal rinda gjald fyri íbinding av vatnveiting og kloakk.

5. Samlað ætlan: Ein samlað ætlan fyri eitt øki skal gerast, sum skal góðkennast av byggimyndugleikanum og vera bindandi fyri allar partar. Í heildarætlanini fyri økið skal takast hædd fyri, hvussu økið verður skipað sum ein samanhangandi heild. Ætlanin skal vísa á felags tilhaldspláss, grøn øki, spælipláss og møguligar felagsbygningar. Kommunan kann krevja, at tað í ætlanini verða ásettar byggilinjur — m.a. fyri at varðveita møguligt útsýni í framtíðini.
Við møguligari sundurbýting og sølu skal upprunaligi eigarin tryggja, at eisini komandi eigarar eru løgfrøðisliga bundnir í mun til felags hentleikar og øki. Hetta verður ein treyt frá kommununi í samband við góðkenning av umsókn um sundurbýti.

6. Gøtur: Ein gøtuskipan skal gerast, sum verður lagað eftir almennu gøtuskipanini. Hetta skal tryggja, at búfólk hava atgongd til tey økini har um vegir, og at almenningurin eisini kann ganga ótarnaður gjøgnum økið undir ábyrgd.

7. Byggilistarlig sniðgeving: Húsini skulu byggilistarligat, viðvíkjandi tilfari og litavali, falla væl inn í økið. Byggimyndugleikin kann áleggja byggiharranum at gera broytingar í verkætlanini, viðvíkjandi estetisku útsjóndini.

**§ 37a: Undirøki L1: Øki til frítíðarhús – náttúra**

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting, er, at tryggja, at byggingin í frítíðarhúsøkjum fellur væl inn í tey náttúrligu umhvørvini og varðveitir dám økisins sum náttúruøki.

2. Byggistig: Samlaða byggistigið fyri økið sum heild, má í mesta lagi vera 0,11. Um økið verður býtt sundur í smærri grundstykkir, skulu felagsøki og fríøki viga upp ímóti byggingini, soleiðis at samlaða byggistigið ikki fer upp um 0,11.

3. Bygging og útbreiðsla: Byggingin skal vera spjadd og harmoniskt lagað til landslagið. Tað mugu ikki setast upp girðingar ella innhegnaðir urtagarðar, og byggingin skal staðsetast soleiðis, at dámur økisins sum náttúruøki verður varðveittur.

4. Byggiregulerandi ásetingar
   Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna, mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildið við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.

5. Gróðurseting: Í minsta lagi 25% av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og/ella runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum náttúruøki.

6. Parkering: Parkering við húsini er ikki loyvd. Felags parkeringspláss skulu gerast, har búfólk og vitjandi kunnu parkera síni akfør. Tað kann tó vera møguligt at koyra nærri at húsunum í sambandi við tøming ella fylling av akfari, arbeiðsørindi og bjarging. Tað er loyvt at gera felags parkeringskjallara undir jørð, um lendið omaná verður endurskapað soleiðis, at tað fellur væl inn í heildina.

**§ 37b: Undirsøki L2: Øki til frítíðarhús – býlingur**

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting, er at tryggja, at bygging í bygdaøkjum fellur væl inn í tey umhvørvini og varðveitir dám økisins sum eitt vanligt føroyskt, tættari bygdarumhvørvi.

2. Byggistig: Samlaða byggistigið fyri økið má í mesta lagi vera 0,3. Um økið verður sundurbýtt í smærri grundstykkir, skulu felagsøki og fríøki viga upp ímóti byggingini, soleiðis at samlaða byggistigið ikki fer upp um 0,3.

3. Bygging og Útbreiðsla: Byggingin skal vera tættari og samfallandi integrerað í umhvørvið. Tað er loyvt at gera smáar urtagarðar við rimagarði ella steingørðum rundan um, men sjálvi húsini kunnu í mesta lagi hava tvær síður, sum liggja innan fyri rimagarði ella garði, og byggingin skal staðsetast soleiðis, at dámur økisins sum býlingur, verður varðveittur.

4. Byggiskipandi ásetingar
   Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.

5. Gróðurseting: Í minsta lagi 15% av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og/ella runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum bygd.

6. Parkering: Parkering við húsini er loyvd, men skal vera skipað soleiðis, at tað ikki órógvar bygdarumhvørvið. Felags parkeringspláss skulu eisini gerast, har búfólk og gestir kunnu parkera síni akfør. Tað kann vera møguligt at koyra nærri at húsunum í sambandi við tøming ella fylling av akfari, arbeiðsørindi og bjarging. Tað er loyvt at gera felags parkeringskjallara undir jørð, um lendið omaná verður endurskapað soleiðis, at tað fellur væl inn í heildina.

**§ 37c: Undirøki L3: Øki til frítíðarhús – urtagarður**

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting er at skapa eitt øki til frítíðarhús, har hvør eigari hevur ein sjálvstøðugan grund við møguleika fyri urtagarði.

2. Byggistig: Byggistigið fyri grundøkini kann í mesta lagi vera 0,25. Vegir og felagsøki kunnu ikki teljast við í byggistigið.

3. Bygging og útbreiðsla: Frítiðarhúsini skulu vera fríttliggjandi, og skulu byggjast á egið grundstykki, sum í minsta lagi skal hava eina stødd á 500 $m^2$, og gjarna størri.
4. Byggiskipandi ásetingar
   Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.

5. Gróðurseting: Í minsta lagi 5 % av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum bygd.

6. Parkering: Parkering skal skipast á egnum grundstykki. Felags parkeringsøki skulu skipast fyri gestir.

**§ 37d: Undirøki L4: húsvognar, kampingsmáttur og tjalding**

1. Endamál: Økið er lagt av til kampingpláss. Talan kann vera um øki til húsvognar, kampingsmáttur og /ella tjalding.

2. Tá ið kampingpláss verða gjørd, útbygd ella munandi broytt, skal ein heildarætlan fyri innrætting og rakstur plássins verða útarbeidd. Heildarætlanin skal leggjast fyri kommununa til góðkenningar, sum liður í málsviðgerðini.

3. Heildarætlanin skal vísa, at innrættingin av kampingplássinum lýkur krøv til trygd, reinføri og virkni. Hon skal í minsta lagi fevna um:

   - Plássskipan og rúmd, undir hesum tal, støðd og frástøðu millum eindir, umframt møguligt býti í øki við brunabeltum.
   - Brandtrygd, undir hesum frástøðukrøv millum eindir, staðseting av sløkkiútbúnaði, atgongd fyri bjargingartól og reglur fyri opnan eld, grilling og líknandi virksemi.
   - Tøknilig skipan, undir hesum elveiting, vatn- og spillivatnsskipan, gassveiting og viðgerð av eldfimum evnum.
   - Felags hølir og bygningar, so sum reinførisbygningar, móttøku-, køks- og felagshølir, sum skulu byggjast og innrættast sambært galdandi byggilóg og brunatøkniligum ásetingum.
   - Rusk- og umhvørvisviðurskifti, undir hesum skipan av ruskstøðum, innsavnan og burturbeining av endurnýtiligum og vandamiklum tilfari, og hóskandi frástøðu til uppihaldsøki.
   - Uppihaldsøkir, herundir spælipláss, leikvøllir og grønar lundir, sum skulu tryggja góð og trygg viðurskifti fyri gestirnar.

4. Allir bygningar, varandi konstruktiónir og innrættingar, sum eru partar av heildarætlanini fyri tjaldingarplássið, eru fevndir av byggilógini og krevja byggiloyvi. Umsókn um byggiloyvi skal sendast kommununi, áðrenn arbeiðið verður sett í gongd.

5. Kommunan kann seta treytir fyri góðkenning av heildarætlanini, fyri at tryggja nøktandi brandfyribyrging, umhvørvisvernd, heilsu og skipaði viðurskifti fyri gestir tjaldingarplássins.